Kommunufelagið

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
J.H. Schrøtersgøta 7
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Dagfesting
23. januar 2026

Okkara j.nr.
26/00274-3

Málsviðgeri
Janus Haraldsen

Tygara j.nr.
25/08929

Viðv. u.t.ll. um br. í ll. um dagstovnar og dagrøkt

Barna- og útbúgvingarmálaráðið sendi 28. november 2025 omanfyrinevnda uppskot til ummælis.

Kommunufelagið hevur í longri tíð tikið lut í einum arbeiði saman við Barna- og útbúgvingarmálaráðnum og viðkomandi pørtum at gera neyðugar dagføringar í dagstovnalógini. Upprunaliga í einum størri arbeiðsbólki og síðani í heyst 2025 í meiri beinleiðis samskifti við aðalráðið.

Kommunurnar umsita og reka sum kunnugt dagstovnaøkið, og tær hava av tí sama stóran áhuga fyri økinum, umframt hópin av servitan. Tað hevur verið sera jaligt at sanna, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur lagt alla tilgongdina til rættis soleiðis at kommunurnar og aðrir áhugapartar hava havt møguleika at koma til orðanna. Fatan okkara er somuleiðis, at ráðið í stóran mun hevur verið sinnað at taka uppskot til broytingar og tillagingar til sín, og tað ber lógaruppskotið somuleiðis brá av.

Kommunufelagið tekur í høvuðsheitum undir við uppskotinum. Barna- og útbúgvingarmálaráðnum kunnugt, so eru tó framvegis nøkur viðurskifti, ið kommunurnar halda eiga at verða løgd afturat ella broytt í uppskotinum. Hetta er viðgjørt og staðfest á borgarstjórafundi í felagnum 23. januar 2026 og nærri greitt frá niðanfyri.

Ásetingin um í mesta lagi 5 vikur stongt má strikast

Í § 3 a, stk. 2, verður lagt upp til, at dagstovnar í mesta lagi kunnu hava stongt í 4 samanhangandi vikur og í mesta lagi 5 vikur tilsamans um árið.

Kommunufelagið hevur frá limakommununum skilt, at summar hava samanlagt virksemi um summarið, meðan aðrar hava stongt í upp til 4 vikur um summarið. At hava samanlagt virksemi merkir vanliga, at bert útvaldir stovnar í kommununi hava opið, og at barnið sostatt kann fáa pláss á øðrum stovni enn har, barnið annars hevur sína dagligu gongd. At stongja merkir í hesum høpinum, at onki annað tilboð er til barnið – vanliga tí kommunan ikki hevur aðrar dagstovnar. At stongja stovnin tænir í tí sambandi fleiri endamálum fyri bæði børn og vaksin, herundir vísa fleiri á, at tað hevur týdning at barnið fær eina langa samanhangandi

frítíð. Í mun til sjálvan raksturin er tað serliga grundað á at kunna avvikla frítíð hjá starvsfólkum og gera neyðugar umvælingar/broytingar, soleiðis at man kann tryggja ein meiri regluligan rakstur restina av árinum.

Hóast summar kommunur mugu gera tillagingar og víðka um upplatingardagatalið, so er hesin parturin av uppskotinum sannlíkt samsvarandi galdandi praksis í flestu kommununum, og tískil nakað sum hóskandi kann verða ásett í lóg.

Hinvegin taka kommunurnar als ikki undir við seinna partinum av uppskotinum um at ein dagstovnur í mesta lagi kann vera stongdur í fimm vikur um árið. Hetta er eitt nýtt krav, sum okkum kunnugt ikki hevur verið eftirspurt av nøkrum áhugaparti; hvørki kommunum, foreldrum ella starvsfólkum. Kravið undrar okkum tí almikið og vísast skal á, at tað fer at hava stórar avleiðingar fyri kommunurnar.

Fyrst av øllum kann tað vera bráðneyðugt at stongja ein stovn í longri tíðarskeið, t.d. vegna umfatandi ella bráðneyðugar umvælingar. Hetta má lógin ikki vera ein forðing fyri. Alt eftir, hvar í landinum man er, skal man annars minnast til, at tað eru ymsar siðvenjur fyri, hvussu tað er stongt. Tað kann vera í sambandi við ráðleggingardagar og skeið, men eisini í sambandi við høgtíðir har stovnar vanliga ikki hava opið hóast talan á pappírinum er um ein vanligan gerandisdag, t.d. millum jól og nýggjár, eins og í framhaldi av einstøkum halgidøgum so sum Kristi Himmalsferðardegi.

Tað er í grundini vónleyst hjá nógvum kommunum leggja seg undir hetta markið uppá 5 vikur, og felagið mælir tí staðiliga aðalráðnum til at taka hetta burturúr uppskotinum.

Harafturat mælir felagið aðalráðnum at hyggja lógartekniskt eftir samanhanginum millum stk. 1 og stk. 2 í § 3 a. Sum vit skilja tað er hugsanin við stk. 1 at geva heimild at áseta vanligar upplatingartíðir, meðan stk. 2 er heimildin at stongja heilt ávísar dagar ella tíðarskeið. Orðingin “undantikið frítíðarstovnar” í stk. 2 kann í tí høpinum, sum hon er sett inn, møguliga tulkast soleiðis, ongin heimild er at stongja frítíðarstovnar yvirhøvur. Viðmerkingarnar leggja upp til nakað annað, og tí verður heitt á ráðið um at eftirhyggja hesum og tillaga tekstin, um tað verður mett neyðugt.

Dagstovnar og skúlar eiga at samskipa frídagar o.a.

Kommunufelagið hevur í øllum arbeiðinum við dagstovnalógini víst á, at tíðin er komin til at land og kommunur í størri mun samskipa nær skúlar og stovnar hava stongt. Yvir tíð hava ment seg ymsar almennar og staðbundnar siðvenjur fyri, hvussu frídagar og serligir arbeiðsdagar hjá starvsfólkum eru, og hetta gevur avbjóðingar fyri allar partar.

Í hesum uppskotinum verður lagt upp til, at kommunurnar skulu gera sítt til at kunna og taka við foreldur, tá ið frítíð hjá stovninum verður løgd til rættis. Hetta tekur felagið fult undir við. Men tað loysir bert ein part av trupulleikanum hjá foreldrum, sum kanska hava smærri børn í

bæði fólkaskúla- og dagstovnaaldri. Hesi kunnu koma í ta støðu, at serligir frídagar ella arbeiðsdagar, so sum ráðleggingardagar, verða lagdir hvør sítt dato hjá skúla og dagstovni. Harvið skulu foreldrini skaffa sær alternativa ansing oftari ella brúka tveir frídagar heldur enn ein.

Kommunur vísa somuleiðis á, at tað – frá teirra sjónarhorni – er ein praktisk avbjóðing, tá ið skúlar leggja til rættis serligar arbeiðsdagar ella líknandi, sum ikki eru samskipaðir við kommunala frítíðarskúlatilboðið. Ítøkiliga kann koma fyri, at skúlin stongir ein ávísan dag, og at kommunan tí kennir seg noydda til eftir førimuni at víðkað tilboðið frá til dømis at byrja eftir døguröa til at byrja tíðliga á morgni. Tað er óheppið og kann harumframt vera óneyðuga dýrt, um broytingin ikki verður løgd til rættis í nóg góðari tíð.

Hetta við frítíðum og serligum frídøgum eiga geirarnir at megna at samskipa betur, soleiðis at bæði foreldur, starvsfólk, skúli og kommunal dagstovnatilboð kunnu leggja síni viðurskifti til rættis við mest møguligum atliti hvør til annan.

Kommunufelagið skjýtur upp, at avbjóðingin verður loyst í hesum lógaruppskotinum ella – um tað ikki ber til – við at landsstýrismaðurin alt fyri eitt tekur stig til at fáa loyst hesa avbjóðing saman við kommununum.

Dagrøktir eru eisini dagstovnar

Sum felagið lesur uppskotið tykist høvuðsfokus vera á dagstovnar og frítíðarstovnar, og væl minni á dagrøktir. Men tað eru kommunur, sum hava valt at skipa seg við dagrøktartilboði og sum ikki hava ætlanir um at broyta hetta.

Sumbiar kommuna er dømi um kommunu, sum hevur eina vælvirkandi dagrøkt fyri børn upp til skúlaaldur, og kommunan hevur ongar ætlanir um at byggja ein barnagarð at seta í staðin fyri dagrøktina.

Kommunur sum Sumbiar kommuna eiga eisini kunna kenna seg aftur í lógartekstinum, og felagið heitir tí á aðalráðið um at broyta serliga § 3 samsvarandi, umframt at gera neyðugar tillagingar í viðmerkingunum.

Tað eigur at verða gjørt greitt, at ein dagstovnur er ein dagstovnur uttan mun til, um tilboðið verður skipað sum dagrøkt ella á stovni.

Kommunur kunnu ikki hækka fakliga støðið einsamallar

Tá ið dagstovnalógin varð løgd fyri løgtingið um aldarskiftið gjørdi trivnaðarnevndin av at seta inn eina serstaka áseting um, at "*Starvsfólkabýtið á dagstovnum skal í minsta lagi verða 2/3 til námsfrøðingatímar og í mesta lagi 1/3 til hjálparfólkatímar*."

Kommunufelagið

Kommunurnar vístu frá byrjan á, at neyðugu fortreytirnar vóru ikki til staðar fyri at halda ásetingina, tí tað var ikki nóg mikið av útbúnum námsfrøðingum. Hetta sjónarmið hava kommunurnar aftur og aftur endurtikið seinastu fjórðingsøldina síðani ásetingin varð samtykt.

Tað ber framvegis ikki til hjá kommununum at liva upp til ásetingina. Til dømis hevur Vestmanna kommuna yvirfyri felagnum víst á, at umleið 36% av teirra starvsfólkum eru námsfrøðingar. Kommunan greiðir frá, at tað er ómetaliga trupult at fáa talið upp. Tað verður støðugt søkt eftir námsfrøðingum, men tað eru oftast ófaklærd, sum søkja størvini.

Vestmanna kommuna er tíverri ikki eindømi í so máta og veruleikin er, at tað er valla nøkur kommuna, sum livir upp til lógarinnar krav um 2/3 námsfrøðingar.

Samstundis hoyrdu vit so seint sum í hesum árinum, at landsstýrið vil hava fleiri námsfrøðingar inn í fólkaskúlan. Seinnu árini hevur somuleiðis verið ein støðugt øktur eftirspurningur eftir námsfrøðingum á almannaøkinum. Samanumtikið økist kappingin um námsfrøðingar altsamt. Tað er alt partur av samfelagsmenningini, men tað skapar sera stórar avbjóðingar, tá ið skiftandi landsstýri ígjøgnum nógv ár eisini hava forsømt at útbúgva námsfrøðingar til vaksandi tørvin. Útboð og eftirspurningur á námsfrøðingum hongur sostatt als ikki saman.

Allar kommunur ynskja at hava eitt sterkt námsfrøðiligt til tilboð á stovnum sínum og at hava eitt høgt fakligt støði. Felagið heldur tó ikki tað sømir seg einum rættarsamfelagi at hava eina lógaráseting, sum kommunurnar ongantíð hava hildið og heldur ikki fara at kunna halda so langt eygað sær inn í framtíðina.

Felagið heldur tað vera av stórum týdningi at halda fast í einum framskygdum máli um støðugt at hækka fakliga støðið á dagstovnaøkinum. Eitt høgt fakligt støði er gott fyri børnini og harvið eisini fyri raksturin av stovninum. Kommunurnar taka tí undir við, at dagstovnalógin eisini hevur eitt mál um at námsfrøðiliga støðið á stovnum okkara skal vera í lagi. Men tað er neyðugt at land og kommunur alt fyri eitt seta seg sama og leggja eina ætlan fyri, hvussu hetta málið skal røkkast – og hvussu lógarásetingin skal síggja út.

Í tí sambandi má tað gerast púra greitt, at tað er ógjørligt hjá kommununum at gera hetta einsamallar. Landið má taka sína útbúgvingarskyldu í álvara og tryggja at aðrar fakbólkar innan námsfrøðiligar útbúgvingar eisini fáa rúmd á dagstovnaøkininum – og kenna seg aftur í lógini.

Felagið hevur onkutíð nevnt, at málið kundi verið minst 1/3 námsfrøðingar, 1/3 námsfrøðiligir hjálparar og aðrar námsfrøðiligar útbúgvingar, og 1/3 aðrir fakbólkar. Um tað er hetta býtið, sum er tað rætta ella ikki, er ikki tað avgerandi. Tað avgerandi er, at tað verður løgd ein verulig og framskygd ætlan fyri fakligheitina á dagstovnaøkinum.

Kommunufelagið

Almannaverkið er partur í málinum og eigur ikki at taka avgerð

Kommunufelagið hevur fleiri ferð víst á, at tað er neyðugt at broyta § 5, stk. 3, um viðgerð av sonevndu ivamálunum, t.v.s. ivamál um, nær kommunan skal veita tilboð og nær tað er Almannaverkið, sum skal veita tilboðið. Heilt stutt er tað soleiðis, at hevur barnið "serligan tørv", so er tað kommunan, sum skal veita tilboðið, meðan hevur barnið "heilt serligan tørv", so skal Almannaverkið veita tilboðið.

Avbjóðingin er, at tá ið hesi ivamálini stinga seg upp – og kommunan og Almannaverkið ikki kunnu semjast – so skal Almannaverkið taka avgerð í málinum. Tað vil siga, at Almannaverkið skal taka avgerð í einum máli, sum Almannaverkið sjálvt er partur av. Hetta er uppá alla mátar óheppið og ein óskikkur, sum eigur at fáa ein enda.

Í skrivum til og á fundum við ráðið hava vit víst á, at ásetingin eigur at verða broytt, soleiðis at ósemjur millum Almannaverkið og kommunur verða lagdar beinleiðis fyri Føroya Kærustovn. Víst hevur verið á, at málini eru sera fá og tey verða vanliga kærd víðari frá Almannaverkinum til Føroya Kærustovn kortini. Talan er tískil um eina einfalda broyting, um ongar fíggjarligar avleiðingar hevur.

Tað er somuleiðis í tráð við nýskipanararbeiðið hjá landsstýrinum at fara burtur frá hesum, tí skipanin gerst einfaldari og ein óneyðugur liður verður tikin burtur úr skipanini. Tað vil somuleiðis føra til, at málini verða avgjørd endaliga nógv skjótari í dag – til stóran fyrimuns fyri barnið og familjuna, sum sjálvandi kunnu hava ampa av at tveir myndugleikar stríðast um ábyrgdarbýtið sínámillum.

Kunngerðarheildin má ikki bert samtykkjast – hon má eisini brúkast

Kommunurnar hava leingi eftirspurt greiðari markamót fyri, nær talan er um eina námsfrøðiliga uppgávu, ið kommunan skal loysa, og nær talan gerst um eina sernámsfrøðiliga uppgávu, ið liggur hjá landinum. Við uppskotinum verður gjørd ein roynd at greina hetta betur, samstundis sum ein kunngerðarheimild er at fara í nærri smálutir.

Hetta er eitt greitt framstig, sum felagið tekur undir við, men fleiri limakommunur hava longu víst á, at hetta uppskotið loysir ikki allar avbjóðingar. Tí er neyðugt í framhaldi av samtyktini av uppskotinum beinanvegin at fara undir arbeiðið at orða ta í § 5 a, stk. 3, nevndu kunngerðina. Hetta eigur sjálvandi at verða gjørt í tættum samstarvi við kommunala geiran.

Sernámsfrøðilig uppráðfesting er neyðug

Vísast skal at enda á, at fatanin úti í nógvum kommunum er, at landið als ikki strekkir til við einari rød av sínum sernámsfrøðiligu uppgávum – sum í verki verða veittar av Sernámi. Kommunurnar hava fyrr upplivað at tænastan frá landinum heilt bleiv burtur í eitt longri

Kommunufelagið

tíðarskeið, og prát hevur enntá verið um, at hetta fer at henda aftur. Samstundis er fatanin úti í kommununum, at landið als ikki ella í alt ov lítlan mun er til staðar við sernámsfrøðiligum tænastum á dagstovnaøkinum. Úrslitið er, at summar kommunur kenna seg noyddar at uppraðfesta egnar skipanir, so tær kunnu lofta tilboðum, sum landið eigur at veita. Tað er als ikki nøktandi, at uppgávur á tann hátt verða trýstar yvir á kommunurnar – uttan nakra politiska viðgerð og uttan at pengar fylgja við at lyfta uppgávunum.

Við støði í hesum vilja vit vísa á, at skal eitt greiðari býti gerast millum land og kommunur, so er avgerandi at landið eisini loysir sínar egnu uppgávur. Við teimum boðum, sum vit fáa frá kommunum kring landið, so ber hetta ikki til at gera uttan eina rættiliga munandi upp- og umraðfesting av Sernámi.

Felagið tekur sostatt ikki undir við, at uppskotið kann setast í verk uttan fíggjarligar avleiðingar sernámsfrøðiliga virksemið hjá landinum.

Vegna
Kommunufelagið

Torbjørn Jacobsen
formaður

Eyðun Christiansen
stjóri